Guvan í kjallararúmi
vásaklæddir menn, sum
biðja tey smáu bíða
uttanfyri
meðan svævað verður

*úr bókini: Heystsuita*

Soleiðis skal lítlin
læra lívsins treytir.
Í spølni og kæti
og djúpum álvara –
eygleiða tey vaksnu
gera sum tey vaksnu

*úr bókini: Heystsuita*

Síggj børnini!
Síggj heimin lata seg upp
við teirra eygum.

*úr bókini: Heystsuita*

## Hagtøl

**Fólkatalið:** Seinast í 18. øld vóru umleið 5.000 fólk í Føroyum. Í 1870 fór talið upp um 10.000, í 1933 upp um 25.000 og í 1973 upp um 40.000. Í 2003 fór talið av íbúgvum upp um 48.000 og er tað hægsta, tað nakrantíð hevur verið. Næstan alla tíðina hevur fólkatalið verið vaksandi, men seinasta árið er vøksturin tó minkaður niður í lítið og einki. Eitt sera týdningarmikið undantak frá hesi gongdini var tó fyrra helvt av 1990-árunum, tá fólkatalið vegna ringar tíðir minkaði nærum 10%.

**Fruktbærið:** Í 1970 fingu konur í Føroyum 3,4 børn í miðal, meðan talið í 2004 var komið niður á 2,6 barn. Hóast hetta, so er fruktbærið í Føroyum nú tað hægsta í Evropu, har øll londini uttan Grønland og Ísland hava færri enn 2 børn í miðal.

**Væntað lívsævi:**
Miðallivialdurin er so líðandi vorðin hægri. Nýfødd dreingjabørn kunnu vænta at liva 77 ár, meðan genturnar kunnu rokna við at fara upp um 81 ár. Fyri 30 árum síðani vóru hesi tølini ávikavist 73 og 77 ár.

**Flytingin:**
Flytingin til og úr Føroyum er stór sammett við fólkatalið, ið eisini verður nógv ávirkað av hesum. Í árunum 1980-88 vóru umleið líka nógvir tilflytarar sum fráflytarar, men í 1989-1995 var fráflytingin sera nógv størri enn tilflytingin, og fólkatalið minkaði tí ógvisligt. Í 1996-2003 var tilflytingin aftur størri, men í 2004 kom aftur vend í til eina netto fráflyting.

*www.hagstova.fo*

# Frá rakstri til rullupylsu

**Nú fjøllini verða gingin og slaktið stendur fyri durum, kemur út forkunnug og snotilig myndabók um slaktið, sæð gjøgnum eygu barnsins.**

MENTAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað er gjøgnum eyguni á børnunum, at vit eygleiða skurðtíðina í nýggju bókini Heystsuita, sum Bókadeild Føroya Lærarafelag gevur í hesum døgum. Heystsuita er bók við fotomyndum eftir Olav Schneider, og evnið, ið verður viðgjørt er slakt í Føroyum, frá rakstri til rullupylsu. Talan er fyrst og fremst um eina søgu í myndum við smáum tekstabrotum og yrkingum, sum fyri ein stóran part er søgd úr barnsins sjónarhorni: hvat síggja barnaeygu, hvussu taka tey lut í hesum serliga universi, og hvat gera tey saman við teimum vaksnu.

Í bókini er hópur av vøkrum huglagsmyndum, sum lýsa, hvussu henda siðbundna mentanin verður løgd niður í børnini og tey ungu, ið fara at taka við.

Tað er Olav Schneider, sum hevur tikið myndirnar. Hann arbeiðir við klassiskari fotodokumentasjón og hevur seinastu árini havt fleiri framsýningar. Yrkingarnar og tekstabrotini eru eftir Sonju Schneider. Hon hevur skrivað og týtt barna- og ungdómsbøkur.

### Serføroysk og týðandi mentan

Í sambandi við útgávuna, sum Mjólkarvirki Búnaðarmanna hevur stuðlað, varð skipað fyri móttøku og framsýning í fundarhølunum hjá Mjólkarvirki Búnaðarmanna við Vegin Langa í Hoyvík týsmorgunin. Har greiddi Hans Jákup Thomsen, leiðari fyri Bókadeildina, frá, og Olav Schneider fekk eisini orðið.

Hans Jákup segði eitt nú, at tá Olav Schneider hevði framsýning í Smiðjuni í Lítluvík í fjør, ivaðust tey í bókadeildini ikki í, at myndirnar høvdu verið sera vælegnaðar til eina myndabók.

- Hetta er ein týdningarmikil dokumentatión av einari elligamlari siðvenja, sum í dag er serføroysk í mun til grannalondini, har tað er forboðið við lóg at slakta heima.

### Gjøgnum eygu barnsins

Og Olav Schneider greiddi soleiðis frá:

- Hendan siðbundna mentanin er tíbetur livandi millum føroyingar enn, og kann hon metast sum eina felags verkætlan millum børn og vaksin, sum øll taka í størsta álvara, segði Olav Schneider. Og hann legði dent á, at bókin ikki er ein dokumentatión av slaktinum, men haraftur-





# Hjálp til børn við sjúkum foreldrum

**Føroya Felag móti Krabbameini fer til heystar at stovna sjálvhjálpsbólkar fyri børn og ung, sum hava foreldur, ið eru rakt av krabbameini**

BØRN OG UNG
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Kathrina Lindenskov Joensen, ið er sjúkrarøktarfrøðingur og sálarfrøðingur, fer at taka sær av nýstovnaðu sjálvhjálparbólkunum, hjá Føroya Felag móti Krabbameini.

- Hesir bólkarnir vera fyri børn og ung, sum hava sjúk foreldur, tí børnini hava tørv á at savnast, meðan foreldrini eru sjúk. Har kunnu tey tosa um felags trupulleikar við onnur, sum eru í somu støðu, tí børn og ung gerast ofta sera einsamøll, tá foreldur eru sjúk, sigur Kathrina Lindenskov Joensen.

- Krabbameinsfelagið hevur í longri tíð ætlað at gjørt eitt tilboð til børn, sum hava sjúk foreldur. Vit fáa fleiri fyrispurningar frá foreldrum og avvarðandi, um tilboð til børn, greiðir Jansy Gaardlykke, formaður í Krabbameinsfelagnum frá.

- Foreldrini síggja at børnini hava brúk fyri hjálp, tí tey síggja, hvussu ringt tað er at tosa við børnini, tá tey hava fingið staðfest eina álvarliga sjúku, sigur Jansy Gaardlykke.

### Nógvar tankar og kenslur

- Tað kann vera ringt hjá foreldrunum, at skula siga børnum frá sjúkuni. Ofta fáa børnini fakta at vita um sjúkuna og viðgerðina, meðan tað ikki verður fokuserað so nógv uppá, hvussu børnini hava tað, sigur Kathrina Lindenskov Joensen, sum hevur royndir við líknandi arbeiði úr Danmark.

- Foreldrini eru glað, um børnini klára skúlan og vanliga frítíðarvirksemið. Børnini ganga og hugsa um tað man fara at ganga. Tey hyggja eftir, hvussu mamman ella pápin hevur tað. Tey hava nógvar tankar og kenslur, sum tey ikki fáa sett orð á. Samstundis ansa tey eftir, hvat tey siga heima, tí tey ikki vita, hvat tey kunnu spyrja um og royna at spara foreldrini.

### Fokus á børnini

Í bólkunum skal fokus vera á børnini. Tey skulu kunna tosa um, hvussu tey sjálvi hava tað, nú mamman ella pápin eru sjúk.

- Vit skulu ikki tosa um mammuna, tað kann gott vera, at tað er natúrligt við hvørt, men tað skal snúgva seg um, hvat børnini og tey ungu halda vera trupult. Hvørjar tankar tey gera sær í samband við, at foreldrini eru sjúk, og hvat tey hava brúk fyri, sigur Kathrina Lindenskov Joensen.

- Tað kann gott vera, at tey fara at tosa um vinir, tí tað er sera týdningarmikið í lívinum hjá børnunum, hvussu teirra samband við vinirnar er. Tey kunnu til dømis tosa um, hvussu vinirnir taka tað, at mamman ella pápin eru vorðin sjúk, hvat tey kunnu tosa við vinirnar um, og hvussu tey kenna seg saman við vinunum, greiðir Kathrina Lindenskov Joensen frá.

Hon heldur tað vera gott fyri børnini at koma saman við øðrum børnum og ungum, sum eru í somu støðu, sum tey sjálvi eru.

Og Jansy greiðir frá, at tey síggja tað eisini í øðrum bólkum, í felagnum, at tað hevur so ótrúliga nógv at siga fyri sjúklingarnar, at sleppa at tosa við onkran,